# Ein ikki-snobbutur stjóri og ein skraddaraseymaður stjóri...

**Fríggjadagin søgdu tey farvæl og vælkomin í høvuðsdeildini hjá Føroya Tele. Tá var samkoma í sambandi við stóraskiftið, nú Kristian Davidsen hevur tikið við sum stjóri, og Andras Róin hevur lagt frá sær.**



*Hákun Steingrímsson, nevndarformaður, saman við fráfarandi stjóranum, Andras Róin, og nýggja stjóranum, Kristian Davidsen*

*Mynd: Jens K. Vang*

STJÓRASKIFTI
*Eirikur Lindenskov*
*eirikur@sosialurin.fo*

Skipað varð fyri hugnaligari móttøku við tónleiki og sangi í Klingruni – høvuðsdeildini hjá Føroya Tele hósdagin.

Nevndarformaðurin í Føroya Tele, Hákun Steingrímsson segði nøkur orð eins og Bjarni Djurholm, landsstýrismaður í vinnumálum og høvuðspersónarnir báðir.

Hákun Steingímsson vísti á, at tey skuldu markera eitt nýtt tíðarskeið í felagnum.

Vit skulu siga einum stjóra farvæl og bjóða einum stjóra vælkomnum.

Andras hevur valt at fara aðrar leiðir, og Kristian hevur játtað at tikið yvir eftir hann, segði Hákun Steingrímsson.

Síðani takka hann Andrasi fyri tíðina:

- Tú hevur longu verið her í 11 ár, og ikki kann sigast annað enn, at tað ahva verið 11 hendingarík ár. Eg pástóð á 100 ára veitsluni, at hetta hava verið tey endingaríkastu 11 árini í søgu felagsins, og tað vil eg gjarna endurtaka, segði hann.

- Fjarskifti sum orð var ikki til fyri 11 árum síðani.
- Fjarskifti sum málsøki er yvirtikið
- Fjarskiftismarknaðurin er liberaliseraður, og monopolið er burtur. Kapping er á øllum økjum
- FarIce kaðalin er lagdur
- Felagið hevur bygt hesi snotuligu húsini, sum so hevur verið við til at savnað felagið bæði so og so.

Hákun Steingrímsson helt, at tað var kanska ikki so løgið, at Andras nú vildi royna nýggjar leiðir, men segði, at hann kortini fór at verða saknaður.

- Vit fara serliga at sakna:
- tíni evni at síggja tingini øðrvísi
- tín máta at fylgja egnum sannføringum, hóast tær onkuntíð gingu móti streyminum
- tína rættvísiskenslu
- tín ikki-snobbuta fasong
- og ikki minst – og tað er mín persónligi favorittur – tíni evni at provokera. Tað er neyðugt til tíðir, og vit vera absolut fátækari uttan tey, eingin ivi um tað!



*Nógv fólk vóru við til móttøkuna í Klingruni*

*Mynd: Jens K. Vang*

Síðani takka Hákun Steingrímsson Andrasi Róin fyri tíðina og beyð nýggja stjóranum vælkomnum. Hann segði, at hóast nógv fundarvirksemi, høvdu tey í nevndini eina rímuliga lætta uppgávu at finna ein nýggjan stjóra til Føroya Tele.

- Eg haldi, at yvirskriftin í Dimmalætting aftan á at navnið varð almannakunngjørt í veruleikanum segði alt: »Skraddaraseymaður stjóri til Føroya Tele«, og vit eru púra samd, segði Hákun Steingrímsson.

• Kristian Davidsen er sivilverkfrøðingur
• hevur HD innan organisatión
• drúgvar leiðsluroyndir frá Ericsson
• royndir sum stjóri á Strandferðsluni
• og so hevur hann arbeitt fyri Føroya Tele fyrr

Við hesum helt Hákun Steingrímsson, at vit ikki kundu siga annað enn, at maðurin er sjálvskrivaður til starvið.

- Kristian, nevndin kennir seg heilt trygga við at leggja dagligu leiðsluna av felagnum í tínar hendur, og vit ivast ikki eina løtu í, at tú ert førur fyri at loysa stóru uppgávurnar, ið liggja fyri framman, og at vit fáa eit tgott samstarv framyvir, segði Hákun Steingrímsson og yngsti honum tillukku og góða eydnu við starvinum.



*Kristian og Andras saman við konunum*
*Mynd: Eirikur Lindenskov*



*Richard Mortensen, stjóri í FT Samskifti, á móttøkuni*
*Mynd: Jens K. Vang*